


# Tú kanst vera við til at avgera vinnaran

**Fyri at atkvøða send eini sms boð til 1930, við koduni, ið stendur aftan fyri tað navnið, ið tú vilt atkvøða fyri. Hvørt sms kostar 5 kr., og tú hevur loyvi at atkvøða einaferð fyri hvørja planet. Øll føroysk fartelefonhald bæði hjá Føroya Tele og hjá Vodafone kunnu luttaka.**
**Tey, ið eru við í atkvøðugreiðsluni taka samstundis lut í lutakasti um fleiri góðar vinningar**

## Tilnevning besti sangari




### Jens Marni Hansen

Ráa rokk røddin hjá Jens Marna Hansen var ein partur av ljóðmyndini hjá Kjølum, All That Rain og seinni eisini Showmonnum. Men í ár er maðurin, ið plagdi at rópa seg næststuttligasta mann í Kollafirði endiliga komin út á fløgu undir egnum navni. Á The Right Way uppliva vit ein nógv búnaðan sangara, ið dugur at brúka røddina til at lyfta tann góða og væl spælda, men heldur vanliga popprokkin uppá eitt óvanligt støði. Sum upphiting fyri Bryan Adams á Tórsvølli vísti Jens Marni, at hann ikki stóð aftan fyri kanadisku fyrimyndina, tá tað kom til røddina. Jens Marni er í ár á fyrsta sinni í uppskoti til heiðurin sum Føroya besta mannliga songrødd.




### Høgni Lisberg

Høgni Lisberg er fløguaktuellur við triðju fløgu síni "Haré Haré" og undir nýggja kunstnaranavninum Hogni. Á nýggju fløguni er hann vaksin við uppgávuni. Frá at verða lovandi tónleikanavnið, ið vit upplivdu á "Most Beautiful Things" og "Morning Dew", er Høgni vorðin ein búgvin komponistur, multitónleikari og eisini ein veruliga góður sangari. Hann hevur lært at brúka røddina á besta og mest áhugaverda hátt, so áhugaverdan hátt, at hann nú telist millum uppskotini til bestu mannligu songrøddina í ár. Tónleikurin á "Haré Haré" er rútmiskt sera áhugaverdur og gevur fyrrverandi Clickhaze trummuleikaranum heilt rætta elementið at spæla sær í, við røddini sum enn einum ljóðføri, ið hann meistarliga brúkar.




### Teitur Lassen

2008 hevur verið eitt stórt ár hjá Teiti Lassen. Eitt ár har gittarin er lagdur til viks, og røddin er vorðin primera ljóðførið. Við fløguni The Singer royndi Teitur nýggjar og slóðbrótandi leiðir, har hansara rødd gjørdist melodiska kjarnan í eini tónleikamynd, ið onkuntíð var serstakliga alternativ. Fløgan legði ummælarar fyri føturnar á dámliga havnarmanninum og lat pallar upp, ið áður hava verið lukkað land fyri Teit. Hetta gav honum tildømis heiðurin at lata upp appilsingula pallin upp á ársins Roskilde Festivali, og fyri stuttum stóð hann á palli í Operaini í Keypmannahavn við Undirhaldsorkestrinum hjá Danmarks Radio í rygginum. Fjórða ár á rað er Teitur í uppskoti til heiðurin besti sangari.




### Kári Sverrisson

Røddin hjá Kára Sverrissyni er egin og áhugaverd. Longu tá hann fyrst í 90'unum sang "Eru vit til" á fløguni Amnesty tónar, var einhvør við bara einum veti av skili fyri tónleiki greiður yvir, at her var talan um ein heilt serligan sangara. Nøkur ár frammanundan gjørdi hann nógv við at vera málmaður í fótbólti, men hann læt seg úr handskunum og tók heldur gittar hond. Kári var sentralur limur í tónleikabólkinum Enekk, sum var ein nýskapandi fólkatónleikarabólkur, og millum og eftir útgávur hjá Enekk hevur Kári Sverrisson spælt sum solistur. Í ár hevur Kári enn einaferð fanga áhugan hjá føroyingum og útlendingum í frálíka bólkinum Orka, har hansara rødd er savnandi lurtaravinarliga elementið. Tí er Kári enn einaferð í uppskoti til heiðurin sum besti sangari í 2008.




### Pætur Zachariassen

Ársins besti sangari í fjør, Boys In A Band oddamaðurin er egin og stuttligur, og kanska mest týdningarmikili brikkurin í putlispælinum, ið ger Boys In A Band til ein av Føroya bestu bólkum nakrantið. Eftir sigurin í fjør í GBOB, hevur bólkurin givið sína fyrstu fløgu út, og Pætur sleppur á fløguni at prógva, at røddin hjá honum klárar at standa seg uttan andlitsbrøgdini og armaveipanina, ið vit kenna á konsertum. Pætursa orkufulli sangur gevur ljóðmyndini hjá Boys In A Band nakað heilt serligt. Hann hevur eitt sera sterkt útrykk, og vinnur nógv hjørtu, tá hann letur munnin upp. Hetta verið seg á Eurosonic í Hollandi, by:Larm í noregi, Canadian Music Week í Kanada, South by soutwest í Texas, The Great Escape í Onglandi, SPOT í Danmark, Iceland Airwaves í Reykjavík ella á 24 tíma konsertferð kring Føroyar.